Í hvør sína ætt

Eingin ivi var um úrslitið uppi á Hálsi mikukvøldið, tá H71 tók ímóti grannunum úr Neistanum. Neistin vann nevnliga ein greiðan sigur, og liðini bæði stevna framhaldandi hvør sín veg

Helgi Justinussen smæddist ikki burtur, tá hann fyri fyrstu ferð kom inn í dysti fyri besta mannsliðið hjá Neistanum, men nýtti ístaðin høvi til at skjóta tvey av málunum í trivaliga sigrinum

Mynd: Álvur Haraldsen

JÁKUP MØRK

H71-Neistin 19-33 (9-16)

Hóast tað ikki var væntandi, at talan fór at gerast um ein serliga spennandi dyst sunnudagin, tá H71 skuldi takast við Neistan, so var kortini nakað av fólkið komið saman í høllini á Hálsi.

Flestu av áskoðarunum mundu helst vera viðhaldsfólk hjá Neistanum, og ikki gekk long tíð, so var greitt, at hesi helst fóru at síggja tað, tey vóru komin iðan til.

Avgjørt beinanvegin

Tað var nevnliga líkt til, at neistaliðið ætlaði sær at avgera dystin alt fyri eitt, og og áðrenn hoyvíkingarnir vóru komnir upp á máltalvuna, høvdu neistamenninir longu fingið sær eina seks máls leiðslu.

Eftir hetta varð ongantíð nakar sum helst ivi um úrslitið, og hóast hoyvíkingar gjørdu ein vørr miðskeiðis í fyrra hálvleiki, so komu teir ongantíð nærri enn tey fýra málini, sum tá vóru á muni.

Sum dysturin leið, gjørdist munurin millum liðini bara alt meira sjónligur, og hóast neistaliðið so at siga ongantíð kom rættuliga í gongd, gjørdust mótstøðuleikararnir alt meira mótfalnir, sum dysturin leið.

Málverjin besti leikari

Líkt var til, at leikararnir hjá hoyvíkingum høvdu mist alla vón um eitt líkinda úrslit, longu áðrenn dysturin byrjaði. Í øllum førum sást millum lítið og einki til tann stríðsanda, sum so ofta hevur eyðkent liðið.

33-19 ljóðar kanska av nógvum, men hevði tað ikki verið fyri ein væl leikandi Jens Skipagøta í málinum, kundi sigurin lættliga verið nógv størri. Fleiri bjargaði hann frágera væl, og lítið er at ivast í, at hann hevur uppiborið landsliðsúttøkuna, sum fyri stuttum varð tillutað honum.

Nýtt andlit

Sum nevnt, so var rættuliga stórur munur á liðunum báðum sunnudagin, og tískil er ilt at meta um avrikini hjá neistaliðnum. Heini og Áki fingu tó enn einaferð prógvað, at skotstyrkin á liðnum er í lagi, og málinum hevði Petur fleiri góðar bjargingar.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki, tá dysturin longu var avgjørdur, kundi Helgi Justinussen trína inn á fyrstudeildarleikvøllin fyri fyrstu ferð, og við tveimum málum kundi hann gera sítt til at staðfesta sigurin og breiddina á neistaliðnum.

Einki avgjørt enn

Hóast dysturin hesu ferð gjørdist alt annað enn spennandi, so hava liðini bæði nógv eftir at spælu um í ár, hóast endamálini tykjast ymisk.

Neistin hevur rættuliga fingið glið á spælið í seinastuni, hóast vestmenningar enn eru fýra stig frammanfyri, so tykist greitt, at viðhaldsfólk og leikarar hava ætlanir um at fanga vestmenningar aftur.

Hoyvíkingar hava somuleiðis nógv at stríðast fyri, tí enn er bert eitt stig niður til tey bæði niðastu liðini á stigatalvuni.

Við hugburðinum, sum sýndur var sunnudagin, vinna teir sær ikki nógv stig afturat, men lítið er tó at ivast í, at hesin hugburður verður broyttur, tá eitt av veikaru liðunum stendur hinumegin miðlinjuna.

Dysturin í tølum:
Málskjúttar:
H71: Allan Mørkøre 4, Barður Brimvík 3, Halgir Dahl Olesen 3, Eyðun H. Højgaard 3, Olaf Vestergaard 2, Annfinnur N. Debess 1, Jákup á Borg 1, Rene Dahl Olesen 1 (1), Tróndur Vatnhamar 1
Neistin: Heini Joensen 10 (1), Áki Olsen 8 (1), Kári Mortensen 4, Jákup Sverri Kass 3, Helgi Justinussen 1, Elmar Ósá 1, Áku Mørk 1, Finnur Hansson 1, Petur Magnusson 1
Brotskøst:
H71 3, Neistin 3
Útvísingar:
H71 6, Neistin 3
Dómarar úr Kyndli:
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

Pól sleppur ikki upp í part

Í trý ár hevur hann verið við hvørja ferð, men í ár sleppur Pól Thorsteinsson ikki at spæla í undankappingini

Hann ásannar sjálvur, at tað svíður. Pól Thorsteinsson er 26 ára gamal, og síðani 2–1 sigurin niðri á Malta 30. apríl í 1997 hevur hann spælt allar ferðirnar. Hann er skrásettur fyri 19 landsdystir, og um alt var, sum tað átti at havt verið, so hevði hann í hesum árinum nátt 26 landsdystum. Í Spania hevði hann komið upp á 21, tá Danmark fer at vitja 16. august hevði hann komið uppá 22, og í síðsta HM undankappingardystinum í ár, sum verður í Jugoslavia 11. oktober, hevði Pól spælt fyri 25. ferð á landsliðnum.

Men nú bendir nógv á, at Pól Thorsteinsson als ikki fer at spæla á landsliðnum í ár. Orsøkin er reyða kortið, sum hann fekk í Prag, tá hann á tímaslagnum brast saman við Patrick Berger. UEFA sektaði føroyska spælaran við leikbanni í trimum undankappingardystum, og tað vil siga, at Pól Thorsteinsson sleppur ikki upp í part í HM undankappingini fyrr enn komandi ár.

Skilja hvønn annan

Pól Thorsteinsson dylir ikki, at hann er sera harmur um, at landsliðsárið tykist vera oyðilagt longu áðrenn fyrsti dysturin verður spældur:

– Næstsíðsta vikuskifti var eg á Svangaskarði og vandi. Tá tosaðu venjarin og eg um spurningin. Allan Simonsen hevði ikki tá tikið avgerð um, um hann ætlaði at biðja meg koma við til Spania ella ikki. Eg segði honum, at eg skilti væl, um hann gjørdi av ikki at taka meg við. Eg gangi í skúla eftir arbeiðstíð, so fyri mítt viðkomandi bilti tað ikki so nógv, um venjarin setti meg eftir í Føroyum. Tað hevur hann gjørt nú, og eg taki tað til eftirtektar, men eg harmist um, at eg ikki havi møguleika at verða við í undankappingardystunum í heyst, sigur Pól Thorsteinsson.

Í bíðistøðu

Tá Pól Thorsteinsson kom á landsliðið umboðaði hann VB, men tey bæði seinastu árini hevur hann spælt við B36. Vágbingar hava gjørt nógv fyri at fáa mista sonin suður aftur at hjálpa til, og tað hevur ljóðað, at Pól Thorsteinsson fer at spæla við VB í ár, men hetta vil spælarin ikki vátta:

– Eg havi ikki tikið endaliga støðu enn, men um eg fari at spæla aðra staðni enn í B36, so verður tað í VB. Um eg fari aftur til VB, so verður tað truplari við venjingini, enn tað hevur verið. Fyrimunurin verður, at tað fer at bera til at koma oftari suður at vitja. Hesi bæði árini, eg havi spælt í B36, hevur tað í fótbóltstíðini bara borið til at fara suður tey vikuskiftini, tá vit hava spælt í Suðuroy, so tað hevur ikki verið so ofta.

JH



Eftir øllum at døma noyðist Pól Thorsteinsson at bíða til 2001, áðrenn hann aftur kann umboða føroyska landsliðið í altjóða høpi

Landsliðsspælararnir fáa ikki vetrarfrí komandi ár

Dystarskráin í HM undankappingini er ólagaligari, enn hon hevur verið undanfarnu ferðirnar, og tað ber stór krøv við sær til FSF og landsliðsspælararnar

John Petersen verður vegna skúlagongd ikki við, tá skjøtul verður settur á landsliðsárið 2000

Tað tykist at vera ein farin tíð, at landsliðsspælararnir í fótbólti halda frí frá høvuðsítróttargreinini frá síðsta landsdystinum í oktober og til eina ferð í januar. Summir av spælarunum plaga at spæla hondbólt hesar mánaðirnar, men komandi ár verður tað trupult at fáa fótbóltin at passa saman við vetrarítróttargreinum.

Síðsti landsdysturin í ár verður spældur í innandura høll í Svoríki 15. november. Í januar komandi ár skal landsliðið spæla á útivølli – í innandura høll! – í Noregi, og í mars komandi ár skal landsliðið spæla tveir HM undankappingardystir á útivølli.

Við at kaga í skránna kunnu vit staðfesta, at fótbóltsárið, sum landsliðsspælararnir nú eru farnir undir, verður langt og ógvuliga langt.

Kenna sítt pláss

Tað gekk skjótt fyri seg, tá umboðini fyri Føroyar og hini londini í okkara HM undankappingarbólki hittust í Zürich fríggjamorgunin. Tað var ikki komið til frokosttíð ella morgunmatartíð, sum tað eitur á føroyskum, tá hvíti roykurin sást, tí skráin fyri tey bæði komandi árini var komin upp á pláss.

Ísak Mikladal, Jens Erik Magnussen og Allan Simonsen umboðaðu Fótbóltssambandið, og teir høvdu frammanundan fingið ábendingar um, hvussu onnur, sum í altjóða fóðbólti viga meiri enn Føroyar, kundu hugsað sær, at skráin fór at síggja út, tí t.d. hevði Russland sent mótstøðulondunum eitt yvirlit, har teir boðaðu frá, hvussu teir vildu hava sínar dystir lagdar.

Føroysku umboðini hava fleiri ferðir ásannað, at tað er ikki teirra leiklutur at spæla fyrstu violin á sovornum fundum sum tí fríggjamorgunin, og soleiðis var tað heldur ikki hesa ferð.

Bara eina ferð heima

Skráin kundi verið óhepnari løgd fyri Føroyar, enn hon gjørdist, men tað er eingin loyna, at føroysku umboðini fingu ikki tvey av høvuðsynskjunum ígjøgnum, sum teir fóru av landinum við. Hinvegin er tað hugaligt, at fyrsti dysturin verður á heimavølli móti Slovenia.

Føroyingar fara ivaleyst at kenna hópin meiri til fyrsta mótstøðuliðið, tá teir koma higar at spæla 3. september, enn vit gera nú, tí Slovenia fer at taka lut í EM endaspælinum í Hollandi og Belgia í summar. Og so er loyvt at vóna, at slovenararnir vera úttúraðir av EM endaspælinum og av, at teir so at siga ikki hava havt summarfrí, tá teir koma til Føroyar.

Annað ynskið hjá føroysku umboðunum í Zürich var, at tveir ella tríggir dystir skuldu spælast í Føroyum í ár. Í tí sambandinum var tað eisini eitt ynski, at ein dystur varð spældur í Føroyum longu fyri summarsteðgin. Tað verður bara ein undankappingardystur í Føroyum í ár, og hann verður leygardagin 3. september. Allir dystardagarnir, sum av FIFA vóru ásettir frammanundan, vóru eftir summarfrítíðina. Tað plagar kortini at bera til at flyta onkran dystin framum, men tað eydnaðist ikki hesa ferð. Hetta komst m. a. av, at Jugoslavia og Slovenia skulu luttaka í EM endaspælinum, og av at onkur av hinum londunum longu frammanundan høvdu avtalað venjingardystir undan summarfrítíðini.

Stórt trýst

Hitt ynskið var, at Føroyar skuldu sleppa undan at spæla í undankappingini tíðliga á árinum. Tað eydnaðist ikki at sleppa undan dystum í mars, og tað setur stór krøv til.

Føroyar skulu spæla í Luksemburg 24. og í Russlandi 28. mars, og tað er spell. Tí hóast landsliðsspælararnir í Noregi og Danmark fara undir landskappingarnar í mars, so er tað einki at siga til, at spælararnir heima á landi og teir í Íslandi ikki eru í fullgóðari dystarvenjing í mars, tí tað verður ikki farið undir heimligu landskappingina og ta íslendsku fyrrenn um mánaðarskiftið apríl/mai.

Føroyar hava bara eina ferð áður spælt landsdyst í mars. Tað var í fjør, og málleysi javnleikurin ímóti Andorra varð ikki hildin at vera nakað serligt.

Tí sigur tað seg sjálvt, at komandi vetur skal nógv orka brúkast upp á landsliðsfótbóltin. Tað hevði ivaleyst komið væl við hjá spælarunum, um teir kundu hildið frí frá fótbóltinum í november, men tað ber ikki til, tí tá skulu teir spæla í Svoríki.

Dystirnir í Svoríki í november og tann í Noregi í januar verða fyrireikingardystir til undankappingardystirnar í mars. Men skal full nytta fáast burturúr, so er tað neyðugt, at landsliðið fer á venjingarlegu t.d. í mars, og tað er nevyan óhugsandi, at venjingarlegan verður longri, enn hon higartil hevur verið.

Hetta hevur alt við sær, at tað eru nógvir lutir, sum skulu fáast upp á pláss, og vit kundu ímynda okkum, at hetta er nakað, sum FSF beinanvegin fer at arbeiða við. Eitt er, at útreiðslurnar í sambandið við landsliðið verða nógv størri, enn tær hava verið. Eitt annað er, at landsliðsspælararnir, umframt bara at fáa frí frá fótbóltinum onkra vikuna í summar og so aftur á sumri í 2001, skulu brúka nógv meiri arbeiðs– og skúladagar upp á landsliðið, enn teir higartil hava gjørt. Og eitt triðja er, at feløgini í Føroyum og í útlandinum skulu lata landsliðsspælararnar frá sær í longri tíð, enn tað higartil hevur verið vanligt.

Hetta er eitt puslispæl, sum tað fer at krevja ikki so lítið at fáa lagt, men sjálvandi ber tað til at fáa tað at ganga upp.

Plettskotini

Sum tað varð nevnt í blaðnum leygardagin, so fer landsliðið at gera tveir dystir á útivølli burturav sær longu í heyst, tá dystirnir í Sveits og Jugoslavia eru á skránni ávikavíst 7. og 11. oktober. Hetta er um somu tíð, sum føroyingar í fjør spældu í Kekkia og í fyrraárið í Litava og í Skotlandi. Avrikini og úrslitini tær ferðirnar vístu, at landsliðið er væl fyri, tá landskappingin akkurát er lokin.

Í fjør lá væl fyri, tá Skotland og Bosnia vitjaðu í juni, og vit hava loyvi at droyma, at tað fer at hilnast eins væl, tá Sveits og Jugoslavia fara at vitja á hásumri í 2001. Sveits fer at vitja í Føroyum fyri fyrstu ferð nakrantíð 2. juni, og Jugoslavia, sum 6. oktober í 1996 vann 8–1 á Svangaskarði, vitjar aftur her 6. juni í 2001.

Í fjør skarst illa í landsdystunum fyrst í september, tá Estland og Litava vitjaðu, men tað átti at verið besta landsliðstíð í Føroyum í hesum mánaðinum. Í 2001 verða aftur tveir landsdystir í Føroyum fyrst í september, og sambært styrkislistan hjá FIFA, so verður tað besti møguleikin av fáa stig í nýggju undankappingini, tá Luksemburg kemur henda vegin 1. september.

Russland vann 5–2 á Svangaskarði 6. september í 1995. Tað verða snøgg fimm ár millum fyrstu og aðru vitjanina hjá russarum í Føroyum. Heimadysturin móti teimum er ásettur at verða 5. september í 2001.

Síðsti dysturin verður niðri í Slovenia 6. oktober í 2001, og tá eiga fyritreytirnar at fara at verða tær somu, sum tær verða komandi heyst. Stóri spurningurin viðvíkjandi tí dystinum fer at verða, um slovenarar tá fara at hava møguleika at vinna eitt pláss í endaspælinum. Um teirra leiklutur verður útspældur frammanundan, so verða fyritreytirnar hjá føroyingum fyri góðum úrsliti ikki verri. Men tað er sjálvandi nakað tíðliga at meta um hetta longu nú!

Vánaligar royndir í november

Tað kemur væl við, at eingin undankappingardystur er á skránni í november, tí tær báðu ferðirnar, tá undankappingardystir hava verið á skránni í november, hevur tað skorist illa.

Fyrra ferðin var 16. november í 1994 í Helsingfors, tá Finnland vann 5–0, og seinna ferðin var 15. november í 1995 í Grikkalandi, tá vertirnir vunnu 5–0. Í báðum 5–0 sigrunum sást tað í 2. hálvleiki, at føroyingarnir so seint á árinum ikki høvdu orku at stríðast í 90 minuttir. Í Finnlandi var støðan 1–0 í steðginum, og í Grikkalandi var málleyst inntil seinna umfarið var hálvrunnið.

Hvussu november fer at hilnast í ár fáa vit at síggja, tá landsliðið fer at spæla innandura í Svoríki. Uttan mun til hvussu tað fer at skerast har yviri, so er tað kærkomið, at stig í undankappingini ikki fara at standa upp á spæl tá.

JH

Skráin í HM undankappingini 2000-2001

FIFA hevur ásett tveir dagar at avgreiða hvørt umfarið í. Føroyingar eru samdir við hini londini um, at allir dystirnir hjá Føroyum skulu spælast mikudagar og leygardagar. Vit hava ikki frætt, um hini londini hava gjørt av, nær teirra dystir skulu spælast, og tí hava vit sett báðar møguleikarnar í yvirlitið

Skráin

Í ár 2000
Leygardagin 2. september
Føroyar–Slovenia
2./3. september
Sveits–Russland
Luksemburg–Jugoslavia
Leygardagin 7. oktober
Sveits–Føroyar
7./8. oktober
Luksemburg–Slovenia
Jugoslavia–Russland
Mikudagin 11. oktober
Jugoslavia–Føroyar
10./11. oktober
Russland–Luksemburg
Slovenia–Sveits

Í ár 2001
Leygardagin 24. mars
Luksemburg–Føroyar
24./25. mars
Jugoslavia–Sveits
Russland–Slovenia
Mikudagin 28. mars
Russland–Føroyar
27./28. mars
Sveits–Luksemburg
Slovenia–Jugoslavia
Leygardagin 2. juni (hvítusunnuaftan)
Føroyar–Sveits
2./3. juni
Russland–Jugoslavia
Slovenia–Luksemburg
Mikudagin 6. juni
Føroyar–Jugoslavia
5./6. juni
Sveits–Slovenia
Luksemburg–Russland
Leygardagin 1. september
Føroyar–Luksemburg
1./2. september
Sveits–Jugoslavia
Slovenia–Russland
Mikudagin 5. september
Føroyar–Russland
4./5. september
Luksemburg–Sveits
Jugoslavia–Slovenia
Leygardagin 6. oktober
Slovenia–Føroyar
6./7. oktober
Jugoslavia–Luksemburg
Russland–Sveits